tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Sjálvstýrisgongdin uppsteðgað

## *Oddagrein*

Stóra fjøldin av føroyingum, ið vil ganga sjálvstýrisleið fer nú at ótolnast. Einki er hent á hesi leið síðani bankakervið bleiv føroyskt í 1993. Edmundsa landsstýri blokeraði opinlýst alla gongd á sjálvstýrisleið og hetta landsstýrið, ið nú situr, hevur líka so effektivt steðgað einari náttúrligari við at gera fullveldisloysning til ein ultimativan kardinalspurning. Fólkið hevur higartil víst tol og latið landsstýrið arbeitt við sínari loysn. Framferðin sá í ávísan mun skilagóð út og ikki minst okkara sympatiski landsstýrismaður í sjálvstýrismálum hevur heiðurin av, at tann tigandi meirlutin hevur verið friðaligur, og at tjakið hevur verið á einum rímuligum støði.Nú tvey umfør av samráðingum við Danmark hava verið, so sæst at ætlaninar hjá Landsstýrinum hava verið órealistiskar - ja, onkur vil kalla tær luftkastellir og okkurt týður uppá, at fullveldisviðhaldsfólkið í ávísan mun er við at fara í panik, tí kjakið er í seinastuni púrasta avskeplað. Vit hava lagt merki til, at tey, sum hava eina aðra meining enn tey „frelstu“ verða hongd út fyri farna lívsleið,útsjónd,uppruna - snøgt sagt „terror“ so eingin skal ditta sær at opna munnin ímóti teimum „ortodoksu“ og rætthugsandi. Hetta er ógvuliga stórt spell og skaðar bæði so og so. Tað er einki so týdningarmikið í einum samfelag sum talufrælsi - innan ella uttan fyri ein ríkisfelagsskap. Duga vit ikki at respektera tað, so eru vit ikki búgvin til politiskt frælsi. Tað er tó ikki bara hesin parturin av fullveldisprocessini, ið er broyttur.

Upplýsingarnir, ið vit fáa um framtíðarútlitini, eru eisini versnaðir á tann hátt, at teir eru alt ov „ullintir“ - hettar hóast vit í dag vita nógv meira enn tá hvíta bók kom fram. í dag vita vit, at skiftistíðin verður 4 ár, og at danski stuðulin verður skerdur við 300 milliónum um árið, so her skuldi verið lætt at rokna út, hvørjar avleiðingarnar verða. Ístaðin verður framhaldandi tosað um 15 ára skiftistíð, og ekspertarnir hjá landsstýrinum, ið fyri nøkrum mánaðum síðani ferðaðust landið runt og greiddu frá, hvar eru teir? Á sama ullinta borð ber svarið hjá Høgna Hoydal uppá fyrispurning um lestrarmøguleikar í framtíðini hjá føroyingum í Danmark. Svarið var, at vit fáa somu rættindi sum aðrir norðbúgvar. Tað inniber, at føroyingar missa rættin til S.U. og sokallaða Føroyafrádráttin. Teir missa rættin til eina røð av ókeypis útbúgvingum, ið ikki eru akademiskar. Samanumtikið rættindi, ið tey, ið ikki hava haft tær stóru fíggjarligu fyritreytirnar, hava notið gott av. Tað vildi verið meira heiðurligt at upplýst um hetta, tá ið svarið í tinginum bleiv givið. Fullveldisætlanin hevur fingið sítt pláss í føroyska samfelagskjakinum og sín møguleika bæði so og so men nú sær út til, at „processin“ er við at koyra føst. At blíva við at troðsa ímóti fólksins vilja førir ongantíð til nakað positivt. Løgmaður kann væl heldur ikki liva við, at hann ikki gekk nakað stig á sjálvstýrisleið tey árini hann sat. Sjálvstýrissinnaðir føroyingar spyrja : Hvussu leingi kann Tjoðveldisflokkurin sleppa at seinka sjálvsstýrisgongdini?

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Ein vanærulig skomm



Noktað verður donskum biskupum at prædika í føroyskum kirkjum.

Biskupar innan okkara egnu Fólkakirkju, bjóðaðir av Føroya hægsa kirkjuliga myndugleika, okkara egna biskupi, vigaðir og funnir ov léttir av nøkrum prestum, ið vegna klandursemi og fávitsku halda seg hava fingið einkarrætt, bæði upp á bíbliu og kirkju.

Orðaskvaldrið um, hvør ið er bíblitrúgvur, ella hvør, ið tulkar bíbliuna rætt, er á so lágum støði, at tað ikki er vert at skifta orð um.

Jesus segði: »Tann av tykkum, sum syndaleysur er, kasti fyrstur steinin á hana«. (Johs. 8,7). Mær vitandi var eingin í tí fylginum, sum helt seg vera nóg syndaleysan.

**Nicolina Jensen Beder**

# Fagnaðarhaldið og biskupavitjanin

*Yvirlýsing til Føroya kirkju.*

Høvuðsstýrið fyri Kirkjuligu Heimamissiónina átalar, at norðurlendskir biskupar, sum alment hava góðtikið samkynt paralag, eftir ætlan skulu prædika í kirkjum okkara 2. hvítusunnudag í ár.

Høvuðsstýrið er, grundað á Bíbliuna, sannf.rt um, at hjúnalag millum mann og konu er hin einasti rætti og besti samlívshátturin. Samkynd paralgø eru ímóti Skriftini og hjúnalagnum.

Í nøkrum norðurlendskum londum er stór ósemja innan kirkjuveggja um samkynd paraløg, og hvørt tey skulu fáa kirkjuliga signing ella ikki. Í finsku kirkjuni og íslendsku kirkjuni er spurningurin til umrøðu. Í norsku kirkjuni eru biskuparnir í tvíningum, har meirilutin - teirra millum Øystein Larsen - er ímóti samkyndum paralag. Svenska kirkjan hevur við biskupum sínum longu gjørt forbønarritual fyri samkynd, og danska kirkjan hevur við biskupum sínum - undantikið okkara egna - hin 28. oktober 1997 givið loyvi til dugstænastu ella andakt at boða frá (markera) samkyndum paralag.

Høvuðsstýri fegnast á ein serstakan hátt í ár saman við kirkju okkara og øðrum samkomum, at Harri okkara, Jesus Kristus, lat seg føða og varð boðaður fólki okkara, men vit harmast, tá ið orð hansara ikki verður virt og hildið.

**Nesvík hin 29 apríl 2000**
Vegna Høvuðsstýrið fyri Kirkjuligu Heimamissiónina
**Hilmar Danilesen, formaður**
**Tom Skaale, aðalskrivari**

# Einfaldur spurningur til Hans Paula, Rolf og Berg



Í einum Frama, sum tit fyri tjúgu árum síðan, allir tríggir høvdu ábyrgdina av, stóð ein sera sjónlig lýsing, har ein knýttur stálnevi bukar stavirnar **FS** fram. Undir hesum stendur:

”Føroyskir Sosialistar” virka fyri stovnseting av føroyskum sosialistiskum tjóðveldi, sum er tann grundvøllur klassaleysa kommunistiska samfelagið skal byggjast á.

Spurningur mín er, um tit enn standa á hesum grundvøllinum. Tað kundi óivað eisini havt áhuga fyri javnaðarfólk at fingið at vita, nú onkur teirra so javnan leggur aðrar politikarar undir bæði líkt og ólíkt.

Fyri tjúgu árum síðan vóru tit væl og virðiliga komnir til mans, og tí kann skriving tykkara tá neyvan kallast ungdómslótir.

Um tit hava skift hugsan, sum ikki er nakað ónattúrligt, hví valdu tit so júst tann flokkin, sum tit í vælskrivaðum greinum og 1. mai dags røðum húðflettu. Javnaðarflokkurin er einki broyttur, annað enn at hann - eins og aðrir Javnaðarflokkar- er farin til høgru. Longur burtur frá grundvølli tykkara.

Onkur heldur tykkum hata tjóðskaparkensluna, tí tað var hon, sum gjørdi av við stýrini í Sovjetsamveldinum og eysturevropu.

Eg vænti mær svar frá tykkum.

Bergur Dam og Hans Pauli Strøm skylda óivað eisini veljarunum í Streymoynni eina frágreiðing.

**Manne Persson**

# Fyrispurningur til Gimme Olsen og Bill Justinussen

*- í sambandi við greinir tykkara í bløðunum herfyri -*

Tað er hugtyngandi, sum føroyskur útiseti, at vera vitni til, at tað føroyska samfelagið verður alt meira merkt av religiøs- fundamentalistikum hugburðum. Tað er skelkandi, at tað eru fleiri ambitiøsar kreftir, ið vilja førka Føroyar nærri eini religiøsari, kúgandi mentan, eins og vit kenna tað nógva aðrastaðni frá úti í heimi. Tað, sum eyðkennir tey mest fundamentalistisku londini er, at fólkið verður hildið niðri við áhaldandi religiøsari heilavasking, og hesi vanlukkustýri hava sum oftast, tíverri, eisini tann fyrimun, at fólkini eru illa upplýst, hava vánaligan lærdóm og tí eru løtt at manipulera við. Fyri at nevna nøkur av hesum londum, kunnu nevnast Afganistan, Pakistan, Iran, Irak og Indonesia.

Nú situr tú óiva og sigur, at hesi lond hava einki við okkum og kristindóm at gera - men tað hava tey nevniliga. Fara vit nøkur hundrað ár aftur í tíðina, so hevði kristindómurin meinlíkan atburð, eins og islam hevur í dag. Harafturat eru kristindómur og islam tvær alin av somu longd, okkara Gamla Testamenti og teirra Koran eru stórt sæð meinlík, og Jesus hevur í koranini sín leiklut sum profetur. Tað eru bert tulkingar og meira ella minni týdningarloysi, sum skilir hesar báðar religiónir.

Men har vit í dag merkja munin, er tann háttur hesar báðar religiónir verða praktiseraðar uppá. Flestu kristin lond í dag eru høgt siviliserað, og eru í takt við at kristindómurin stigvíst hevur fingið minni og minni týdning fyri samfelagsgongdina vorðin betri og rættvísari samfeløg at liva í. Argumentatión, opinleiki og logikkur er vorðið grundarsteinurin undir tí demokatisku skipanini. Og ikki sum fyrr, religiøs intoleransa og fanatisma.

Møguliga er grundin fyri, at tey islamisk fundamentalistisku londini eru fleiri hundrað ár aftan fyri okkum, tá tað snýr seg um at virða menniskjarættindir og demokrati, tann, at Muhamed livdi 600 ár aftaná Jesus, og at teirra religiøsitetur av teirri grund nústani kulminerar eins og okkara gjørdi tað fyri nøkrum hundrað árum síðani.

Men tit vilja eftir øllum at døma halda fast við fundamentalismuna og stramma hana uppaftur meira, um tit fáa møguleika fyri tí; og hetta hevur við sær, at Føroyar verður eftirbátur og undirútviklað í mun til okkara grannalond.

**Nú til fyrispurningin**. Eg vil biðja tykkum um at gjøgnumhugsa, at tá tit siga, at bíblian skal takast bókstaviliga, og at hon er SANNLEIKIN - og tí skulu samkynt diskriminerast, sambært Rómverjabrævinum 1. vers 24 og út - um vit so ikki eisini skulu innføra avhøgging av hondum og fótum, og útslíting av eygum hjá fólki, tá ið vit neyðars syndugu skapningar verða freistað (og hvør hevur ikki onkuntíð verið tað í lívi sínum). Tí skal bíblian takast bókstaviliga (altso fundamentalistiskt), so eiga hesi omanfyri nevndu ting eisini at verða praktiserað.

Í hesum sambandi, sí: Matteusarevangeliið 5. vers 29-30, Matteusarevangeliið 18. vers 8-9, og Markusarevangeliið 9. vers 43-47.

**Århus 20/5-00**
**Hilmar Simonsen**
**E-mail:**
**Hilmars@mobilixnet.dk**



# Alivinnan er komin heimaftur

*P/F Vestlax hevur gjørt avtalu við altjóða alifyritøkuna Pan Fish ASA um samstarv í føroysku alivinnuni. Avtalan merkir, at tey alibrúkini, Pan Fish ASA herfyri keypti frá føroyingum, aftur koma undir føroyska leiðslu. Talan er millum annað um alt Sundalagið*

EDVARD JOENSEN

Vestlax er nú vorðið ein rættiligur risi. Bæði innan alivinnu, og sum felag sum heild.

Mánadagin gjørdi Vestlax avtalu við altjóða alifyritøkuna Pan Fish ASA, sum norðmenn eiga, um samstarv í alivinnuni í Føroyum. Avtalan ber í sær, at tær alistøðirnar, sum Pan Fish herfyri keypti í Føroyum, nú verða lagdar undir nýggja felagið, sum fer at eita Vestlax.

Frímund Hansen, stjóri í Vestlax, sigur, at tað merkir, at føroyingar nú aftur hava avgerðarrættin yvir hesum alibrúkunum.

Talan er um alibrúkini í Sundalagnum og í Oyndarfirði. Smoltstøðina Laksá og sláturvirkið í Oyndarfirði.

Norðmenninir hava keypt ein part av Vestlax, men latið avgerðarrættin yvir alivinnuni í Føroyum til føroyingarnar. Býtið í felagnum er soleiðis helvt um helvt, sigur Frímund Hansen, sum tó ikki vil upplýsa, hvussu nógvir pengar eru ímillum, nú selt og keypt er.



*Av Vestsalmon í Kollafirði, har leiðslan í Vestlax heldur til, fer umleið helvtin av føroysku alivinnuni at verða stýrd í framtíðini ( Savnsmynd)*

Samanleggingin merkir eisini, at Vestlax fær ein av fýra føstum nevndarlimum í Pan Fish.

Tað er við rationaliseringum fyri eyga, at teir eru farnir í hetta samstarvið, sigur Frímund Hansen. Og tann rationaliseringin fer so at merkja, at eitt nú kryvjivirkið í Oyndarfirði helst fer at lata aftur. Tó verður tað nokk ikki beinanveg, sigur Frímund Hansen, stjóri á Vestlax.

Hinvegin fer samstarvið at merkja, at umsetningurin hjá felagnum verður nógv størri, enn hann er hjá báðum fyritøkunum í dag.

Frímund Hansen sigur, at teir vænta at kunna umseta fyri umleið tað sama, sum øll føroyska alivinnan gjørdi í fjør. Hann nevnir eitt tal, sum nærkast teimum 800 milliónunum.

Frímund Hansen, stjóri í Vestlax, sigur, at hóast tað kanska endar við eini niðurlegging av virkinum í Oyndarfirði, fer nýggja felagið at gjalda fleiri arbeiðstímar út árliga, enn bæði tey gomlu gjørdu tilsamans.

Eisini eginpeningurin er stórur í nýggja felagnum. Góðar 100 milliónir krónur, sigur stjórin.

Í grundini er hetta ikki nakað nýtt, at hesi bæði feløgini samstarva. Nú verður samstarvið bara betri útnyttað fíggjarliga, sigur Frímund Hansen.

Fyrr hava hesi bæði feløgini samstarvað um so mangt, sum er felags í alivinnuni. Millum annað flutning millum alistøðirnar og sláturvirkini.

Hendan samanleggingin ger eisini felagið so mikið stórt, at nú ber til at seta eitt nú leverandørunum treytir.

Frímund Hansen sigur, at samanleggingin merkir, at Vestlax nú eigur eina knappa helvt av føroysku alivinnuni. Talan er um eini 40-45% av samlaðu nøgdini í føroysku alivinnuni. Í loyvum er talan um ein fjórðing, sigur hann.

Hetta ber eisini í sær, at betri ber til at stýra vinnuni, og sostatt fer hetta eisini at koma umhvørvinum til góðar, tí nú eru tað færri alarar á hvørjum firði.

Frímund Hansen sigur, at norska felagið Pan Fish, sum er skrásett á børsinum í Oslo, alir eini 80.000 tons av laksi árliga um allan heim.

Nýggja Vestlax felagið fer at ala umleið 30.000 tons av sílum og laksi árliga.



*Anna Kirstin Thomsen setti musikstevnuna á Oyrarbakka ( Mynd: Edvard Joensen)*

# Musikstevna á Oyrarbakka

*Árliga musikstevnan varð í ár hildin á Oyrarbakka, hóast ætlanin var, at hon skuldi vera á Tvøroyri. Men ferðamøguleikarnir til Suðuroyar oyðiløgdu hetta*

EDVARD JOENSEN

Sum vanligt hevur verið í 35 ár, varð musikstevnan hildin dýra biðidag. Tvøroyrar Hornorkestur skuldi skipa fyri stevnuni á Tvøroyri, men tað varð broytt soleiðis, at talan gjørdist um eitt felagstiltak á Oyrarbakka ístaðin.

Vanligt er, at orkestrini skiftast um at skipa fyri stevnuni. Men nú Smyril fór í dokk, fór alt tiltakið, sum tvørafólk høvdu skipað fyri, í vaksið, so at siga. Tað var rætt og slætt ómøguligt at flyta fólk og útgerð um Suðuroyarfjørð við Claymore. Og tað siga suðringar fyri púra vist, at hetta verður ikki aftur. »NO MORE« hava teir doypt skipið.

Anna Kirstin Thomsen segði, tá hon setti stevnuna í Felagsskúlanum á Oyrarbakka, at var tað ikki við góðari hjálp norðaneftir og onkrum ljósum høvdi í Klaksvík, varð als eingin stevna í ár. Og hon beyð í setanarrøðu síni øllum vælkomnum til musikstevnu á Tvøroyri dýra biðidag næsta ár. Tá varð klappað í fimleikarhøllini í Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

Ikki tí. Áhoyrararnir vóru alt ov fáir, sum høvdu leitað sær til hesa konsertina, sum Tvøroyrar Hornorkestur byrjaði. Tá konsertin byrjaði vóru bara nøkrir heilt fáir áhoyrarar uttaneftir, umframt spælararnar úr hinum orkestrunum, á áhoyrarapl ássunum. Men tað vaks tíbetur eitt sindur, sum út leið.

Átta vóru orkestrini, sum fingu 15-20 minuttir í part. Onkuntíð hava orkestrini verið fleiri til musikstevnurnar, sum verið hava.

Vanligt er at enda musikstevnukonsertirnar við einum felagslagi. hesaferð var tað ein sonevnd »Tvøroyrarpotpourri« við løgunum »Eitt fótbóltslið sum TB - Eg hitti fólk, sum siga, at eg droymi - Í summarskrúð bjørt Suðuroyggin lá«. Og tað ljóðaði bara heilt væl.

Musikstevnan eigur at vera dýra biðidag, og tað ætla tvørafólk eisini, at hon skal vera komandi ár. Á Tvøroyri. Um Guð vil, og Smyril siglir.

